Álit

í

løgtingsmáli nr. 77/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Gjaldfreist í sambandi við altjóða trætumál, víðkað heimild at vitja peningastovnar í eftirlitshøpi o.a.)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð 19. mars 2024 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2. apríl 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við TAKS.

Hetta lógaruppskotið snýr seg fyri mesta partin um altjóða skattaviðurskifti.

Føroyar blivu í 2017 limur í Global Forum, og í 2019 blivu Føroyar limur í IF BEPS (Inclusive Framework on Base Erosion and Profit Shifting).

Global Forum arbeiðir við umbýti av skattaupplýsingum og IF BEPS arbeiðir m.a. við eini ætlan um at broyta tillutanina av skatti hjá heimsins størstu samtøkum frá landinum, har samtakið hevur sín heimstað, til londini, har samtakið hevur sínar marknaðir.

Sum limur í hesum skattatorgum (fora) verða bæði okkara lóggáva og okkara tøkniligu skipanir, almennar og privatar, eftirmettar av javnlíkum uttanífrá í sambandi við sonevnd peer review.

Hetta uppskotið inniheldur ymiskar broytingar og tillagingar, millum annað at fáa eina skipan við gjaldfreist, har ein gjaldskái er í mun til ta freist, sum annars hevði verið galdandi í sambandi við sínámillum avtalur í tvískattamálum.

Ein onnur broyting er at geva TAKS heimild til at fara á vitjanir hjá peningastovnunum til tess at tryggja hóskandi nærlagni (due diligence) og at tryggja, at rættar fráboðanarmannagongdir verða nýttar í sambandi við altjóða umbýti av skattaupplýsingum.

Ein samd nevnd tekur undir við, at hesa broytingar verða framdar.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 18. apríl 2024

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	